VIÐMERKINGAR

# Førum Fram



Ítróttarsamband Føroya stendur í dag á gáttini til olympiska viðurkenning. Olympiska rørslan er alheims ítróttarsambandið, ið viðurkennir altjóða sersambond og ítróttarsambond úr einstøku londunum. Treytirnar, ÍSF skal lúka, eru partvís at umboða eitt land.

Ítróttarsambandið hevur tryggja sær stuðul frá norðurlendsku ítróttarsambondunum og olympisku nevndunum, eins og frá teimum altjóða sersambondunum innan ítrótt, har føroyingar eru viðurkendir. Vit hava nú fingið greiða váttan um, at danski forsætisráðharrin eisini stuðlar umsókn okkara. Tí skuldi heldur ongin politisk forðing verið fyri viðurkenning.

Fremstu treytirnar fyri limaskapi eru tó, at Ítróttarsamband Føroya er altjóða viðurkent í øðrum høpi, og at føroysku sersambondini eru limir í teimum altjóða sersambondunum.

Ítróttarsamband Føroya er limur í fleiri øðrum altjóða ítróttarsamgongum, millum annað ENGSO, European Non-Governemental Sports Association og De Nordiske Fælles-kommitéer, samgonguni av norðurlendskum ítróttarsambondum og olympiskum nevndum. Ongin mótstøðu hevur verið frá nøkrum europeiskum landi móti hesum viðurkenningum.

Føroysku sersambondini hava vunnið sær umboðan og viðurkenning frá altjóða ítróttarsambondunum innan hesar ítróttargreinar: badminton, borðtennis, fótbólt, flogbólt, hondbólt, judo, skjóting, svimjing og ikki at gloyma ítrótt fyri brekað - har vit longu hava vunnið olympiskt gull. Føroyingar gera seg galdandi altjóða sum leikarar, altjóða dómarar og sum limir í tekniskum nevndum.

Tað er Føroya íðkandi ungdómur resti, sum hevur avrikað tær veruligu fortreytirnar fyri føroyskari olympiskari viðurkenning.

Føroyska umsóknin var latin inn fyrst í 1980 árunum. Olympiska nevndin góðkendi tá viðtøkurnar hjá Olympisku Nevnd Føroya. Men tá luku vit ikki treytirnar um viðurkenning innan nóg nógv altjóða sersambond. Síðani tá er Olympiska Nevnd Føroya løgd saman við ÍSF, sum tí nú eisini er Olympiska Nevnd Føroya. Nú eru teknisku treytirnar loknar - níggju føroysk sersambond eru altjóða viðurkend, minstakravið er einans fimm slíkar viðurkenningar.

Føroyska umsóknin er ein framhaldandi viðgjørd umsókn. Síðani hon á fyrsta sinni varð latin inn, eru íatróttarsambond umboðandi fýra ikki-fullveldislond viðurkend.

Føroyska viðurkenningin velst nú um føroyskt samanhald og um royndir okkara at vísa á, at vit kunnu vera við á altjóða leikvøllinum, bæði ítróttarliga og fyriskipanarliga. Vit heita tí á allar føroyingar um at standa saman tvørturum øll vanlig hugsjónarlig mørk og steðga øllum illgitingum og negativari skriving um føroysku royndirnar.

Føroysk ítróttarfólk hava viðurkenningina uppiborna.

Føroyar Framá, í ítrótti vinn!

Saman standa vit stinn!

Við ítróttarkvøðu

**Heðin Mortensen**
*Forseti í Ítróttarsamband Føroya*
**Anfinn Kalsberg,**
løgmaður
*Verji hjá ítróttarsambandi Føroya*

# Í Føroyum - skulu føroyingar ráða!

**Deirdre Hansen**
*Valevni Fólkafloksins í Eysturoynni*



Í stevnuskrá fólkafloksins stendur: "Tjóðskaparliga stavnhald fólkafloksins er, at í Føroyum skulu føroyingar ráða. Hetta ber í sær, at endamál floksins er fult sjálvstýri fyri Føroyar, soleiðis at vit fáa lóggávuvald á øllum økjum og – úteftir telja við sum suverenur statur javnbjóðis øðrum sjálvstýrandi londum."

Tá ungdómur nærkast manndómi, skal hann taka støðu til, um hann vil flyta heimanífrá. Flytur hann, so gerast avbjóðingarnar nógvar, og verður hann verandi heima, so gerast bondini tættari. Longri hann bíðar, verri verður at flyta. Tann, ið flytur, má standa á egnum beinum og taka støðu til øll mál, ið hava við hann at gera, hesin búnast tí og gerst førur fyri fleiri avbjóðingum. Tann, ið verður verandi heima, endar í ringasta lagi við at fáa eina óloysiliga "symbiosu".

Sum føroyingar mugu vit taka støðu til, um vit vilja standa á egnum beinum ella halda fram við at fjala okkum aftan fyri "skjúrtið á móður Danmark". Um vit velja at ráða í egnum landi, vil tað tó ikki siga, at vit venda Danmark ella øðrum londum baki, - bert tað, at vit taka fulla ábyrgd av egnum landi. Um føroyingar sjálvir skulu fáa samfelagshjólini at mala og búskapin at hanga saman, fremur tað ábyrgd, hugflog og menning.

Farna valskeið hevur tað eydnast samgonguni - við hjálp frá føroyska vinnulívinum - at vent gongdini í samfelagnum. Blokkurin er lækkaður, skuld landskassans er lækkað og inntøkur landskassans eru hækkaðar.

Skjøtil er settur á sjálvstýrisgongdina. Føroyingar eru sum tjóð komnir í "manndómin", vit hava viljan, áræði og útbúgvið fólk, eina fjølbroytta vinnu, ið kastar nógv av sær og góðar vónir um at megna at ráða í egnum landi.

Hesin skynsami politikkur, sum samgongan – við frælslynta Fólkaflokkinum - hevur megnað at rikið farna valskeið, er tí verdur at royna enn eitt valskeið.

# Sjón fyri søgn

## Aftursvar til Torbjørn Jacobsen, fólkatingsmann

**Jógvan við Keldu**



Eg takki fyri viðmerkingina til grein mína. Tað er altíð ein fragd at lesa um, tá Torbjørn fer í bardaga. Frálíkt, mergjað málsnið, breið penslastrok, dramatikkur og gott undirhald.

**Ikki við mýkindum**
Torbjørn er eisini farin at brynja seg til valstríð. Tað skal ikki vera við mýkindum. Mikil málageipan um hestar, vápn og mergjaðar stríðsmenn "ríða teir út av Fraklandi". Tann stóri bardagin á landi er ikki nóg mikið fyri Torbjørn, hann brynjar seg til drúgvan sjóbardaga, har hann einsamallur leggur til brots móti ikki minni enn tveimum fólkafloksmonnum, sum onkur hevur sett at verja hvør sítt borð á Fólkaflokssskútuni fyri at avmarka tað øgiliga mannfall, ið har veðrur, tá Torbjørn reiggjar politisku vápini.

Torbjørn hevur tann eginleikan, at hann hoyrist vítt um vøll. Heilt av Christiansborg hoyrist hógvadundur og vápnagný, tá hann leggur í bardaga, "blás í hornið Ólivant". Teir donsku harrar gyrdir í brøkur eru lamslignir, og sagt verður, at sjálvt gamla kempan Holgar Danski hevur ikki havt eina einastu stilla stund undir Krúnborg, síðani tjóðveldismaðurin Torbjørn trein inn á fólkating.

**Ikki sørt firtin**
Tað er ikki sørt heldur, at Torbjørn er firtin. Eg vísti bert á munin millum Fólkaflokkin og Tjóð-veldisflokkin. Fólkaflokkurin er lágskattaflokkur meðan Tjóðvelisflokkurin ræðist skattalættar. Fólkaflokkurin er borgarligur sjálvstýrisflokkur, meðan Tjóðveldislfokkurin er sosialistiskur loysingaflokkur. Hetta dámar ikki Torbjørni, skilst. Eg vildi eisini vera við, at Tjóðveldisflokkurin í sjálvsstýrismálum hevði verið ov víðgongdur og óstorsligur, tað liggur til yngra ættarliðið í flokknum, sum nú tekur við. Tað dámdi heldur ikki Torbjørni. Men minst av øllum dámdi honum, at eg segði Tjóðveldislfokkin vera ein sosialistiskan flokk.

**Ein erlig søk**
Her vísir Torbjørn uppaftur ein eginleika, sum undrar ikki sørt. Í svarinum megnar hann, elegant og lættliga sum ein ballerina at hoppa undan heitinum sosialist. Hann bølir hesari sannroynd sum reyðargull. Torbjørn plagar ikki, so vítt eg veit, at krógva sín "samleika", og at vera sosisalistur er sjálvandi ein erlig søk.

Tað er onki at skammast yvir. Ein og hvør hevur loyvi at hava eina politiska sannføring og eisini sínar fyrimyndir, soleiðis er tað tíbetur enn í okkara landi.

**Á fleiri hestum**
Fyri at koma aftur til hestar og politikk, so fyrikemur tað mær, at ein politikari, sum roynir at geva fóki ta fatan, at hann er nakað annað enn hann í veruleikanum er, má sigast at ríða á fleiri hestum. Uppaftur verri er tað, um ein heilur politiskur flokkur ger hetta sama. Tá er skjótt til, at henda fløkjan førir til, at flokkurin kemur í bardaga ímóti sær sjálvum.

Torbjørn sigur í svari sínum, at tann flokkur, sum ríður á fleiri hestum, hevur eina trupla søk. Eftir tí at døma verður tað kanska ikki so lætt hjá Torbjørni og hansara monnum, so kanska vit á okkara skútu fara at hóra undan kortini.

**Høvuðsorsøkin**
At lýsa Torbjørn og Tjóðveldisflokkin sum annað enn sosialistiskan er so langt burturvið í mínari verð, sum t.d. at tvíhalda, at kollveltingarmenninir á Kuba eru borgarligir. Hugsa tær Fidel ella Che borgarligar. Óhugsandi og absurdur tanki eisini hjá okkum borgarligu. Og júst hetta, sum roynt verður at fjala út yvir, sosialisman, er eftir mínum tykki høvuðsorsøkin til, at samstarvið við Tjóðveldislfokkin hevur verið so stríggið:

- Viðvíkjandi sjálvstýrismálinum, har framferðin hjá landsstýrismanni tykkara var stríðshugakend og óstorslig. Løgmaður hevði úr at gera við at stýra millum skerini orsakað av tí konfrontatiónskós, sum landsstýrismaðurin støðugt vildi inn á. Sermerkt sosialistisk stríðslyndi, sum er munandi økt, síðani teir hóvligu tjóðveldismenninir eru farnir út í myrkrið. Onki vísti seg at bera til við yvirtøkum ella á sjálvstýrisleið yvirhøvur, fyrr enn løgmaður tók málið í egnar hendur og vísti sítt samráðingarhegni.

Viðvíkjandi skattamálum, har Tjóðveldið saman við okkum skrivaði undir sáttmálan at lætta skattatrýstið á miðal- og láginntøkum, men kortini stakk frá, tá tða skuldi fremjast, tí hann heldur uppá, at sjálvt arbeiðaralønir og smámannalønir eiga at vera toppskattaðar. Sermerkt sosialistiskt fyribrygdi at ræðast skattalættar. Tað er jú bert "Staturin", sum dugir at fyriskipa og fáast við pening.

**Sjón fyri søgn**
Tá Fólkaflokkurin kortini valdi einsamallur at leggja uppskotið fram, noktaðu tit at viðgera málið, og flestu tykkara rýmdu úr tingsalinum, sum fornermaðir smádreingir. Lítil virðing fyri Føroya løgtingi.

Hesin maskeradupolitikkur Tjóðveldisfloksins er ikki tað, vit roknaðu við, tá vit fóru í samstarv. Men kortini hava umboð okkara í Landsstýrinum og á tingi telva soleiðis, at væl er komið burturúr í hesum valskeiðinum, og tað er at fegnastu um. Okkur er eisini Torbjørn fyri at takka. Men skeiðið hevur samstundis sannført okkum um, at munurin millum flokkarnar er stórur. Tað er sjónfyri søgn.




# KURSUS I ASSERTIONSTRÆNING

**– PERSONLIG STYRKE**

**Underviser**
Assertionstræner og familieterapeut ***Kirsten Rudbeck***

**Formål**
At fremme det PSYKISKE ARBEJDSMILJØ, opbygge SELVVÆRD og styrke et LIGEVÆRDIGT KOLLEGIALT SAMSPIL.

**Målgruppe og tidspunkt**
*Medarbejdere* 10. – 11. oktober og 14. – 15. november 2002.
*Ledere* 14. – 15. oktober og 18 – 19. november 2002.

**Pris: kr. 4.400,–**

Kurset har fokus på tre områder:

KOMMUNIKATION
- at udtrykke sig personligt, ærligt og direkte,
- at udtrykke sine meninger og behov samtidig med at man er åben og lydhør i forhold til modparten,
- at sætte grænser uden at krænke andres.

SAMARBEJDSRELATIONER
- at forholde sig konstruktivt til problemer,
- at formulere kritik uden at ligeværdigheden går tabt,
- at modtage kritik fra andre uden at føle sig uduelig,
- at give og modtage velment ros og anerkendelse,
- at håndtere konflikter uden at bruge magt.

PERSONLIG UDVIKLING
- at respektere andres forskellighed fra en selv,
- at kunne se andres og egne ressourcer,
- at udvikle større indlevelsesevne,
- at udvikle højere selvfølelse og selvværd.

Form
Undervisningen veksler imellem oplæg og praktisk træning, som det forventes, at kursisterne tager aktivt del i.

**Tilmeldan innan 1. apríl hjá Ólavi Groth • tlf. 220589 • e-mail: ogroth@post.olivant.fo**






a a ø a o
r a o ø a y o

PF. VALDEMAR LÜTZEN
Skálatrøð 14 • Postboks 20 • 110 Tórshavn • Tel. 31 79 20



**Almannastovan**
Jónas Broncksgøta 27 – Postrúm 3096
Tlf. 315480 – Telefax 318850
FO-110 Tórshavn

## Starv á Almannastovuni

Á Almannastovuni er eitt starv sum málsviðgeri á pensjónsdeildini í Tórshavn leyst at seta skjótast til ber. Arbeiðstíðin er full tíð.

**Arbeiðsuppgávur**
- málsviðgerð
- útrokning, áseting og ávísing í pensjónsmálum
- umrokning og eftirrokning
- annað fyrisitingarligt arbeiði

**Útbúgvingarkrøv og royndir**
- skrivstovuútbúgving, HH ella onnur fyrisitingarlig útbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góðan kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góðan málburð í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga
- von/vanur at arbeiða sjálvstøðugt

**Um deildina**
Arbeiðsøkið hjá pensjónsdeildini er ráðgeving og vegleiðing í pensjónsspurningum, og støðutakan til og fyriskipan og avgreiðsla av veitingum sambært galdandi lógum innan pensjónsøkið.

Á deildini arbeiða 13 fólk.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Dan Lamhauge, deildarleiðara á tlf. 31 54 80.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, postsmoga 3096, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 02.04.2002.



**Almannastovan**
Jónas Broncksgøta 27 – Postrúm 3096
Tlf. 315480 – Telefax 318850
FO-110 Tórshavn

## Avloysarastarv á Almannastovuni

Á Almannastovuni er eitt starv sum avloysari fyri málsviðgera við fyribils tænastu á pensjóndeildini í Tórshavn leyst at seta skjótast til ber og til 15.9.2002. Arbeiðstíðin er full tíð.

**Arbeiðsuppgávur**
- málsviðgerð
- útrokning, áseting og ávísing í pensjónsmálum
- umrokning og eftirrokning
- annað fyrisitingarligt arbeiði

**Útbúgvingarkrøv og royndir**
- skrivstovuútbúgving, HH ella onnur fyrisitingarlig útbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góðan kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góðan málburð í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga
- von/vanur at arbeiða sjálvstøðugt

**Um deildina**
Arbeiðsøkið hjá pensjónsdeildini er ráðgeving og vegleiðing í pensjónsspurningum, og støðutakan til og fyriskipan og avgreiðsla av veitingum sambært galdandi lógum innan pensjónsøkið.

Á deildini arbeiða 13 fólk.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Dan Lamhauge, deildarleiðara á tlf. 31 54 80.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, postsmoga 3096, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 02.04.2002.